umhvørvisstovan

# Ískoyti til umhvørvisgóðkenning

sambært kapittul 5 í Ll. nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **P/F Mowi Faroes** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Heygstrøð 2, 490 Strendur | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| Aling av laksi og síli | |
| Alifjørður: | |
| C- 17, Sandsvág og Skúvoyarfjørður | |
| Aliøkið: | |
| A-90 | |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 14/00590-89 | 26.03.2021 |

Umhvørvisstovan, tann 26.03.2021

Suni Petersen, deildarleiðari / Katrin Haraldsdóttir Jensen, málsviðgeri

## 1. Umsókn

P/F Mowi Faroes hevur ætlanir um at víðka aliøkið á Sandsvág, A-90, og hevur í tí sambandi hin 17. mars 2021 sent Umhvørvisstovuni umsókn um ískoyti til verandi umhvørvisgóðkenning, mál nr. 14/00590-20, til alivirksemi á víðkaða aliøki A-90 á alifirði C-17, Sandsvág og Skúvoyarfjørður.

## 2. Góðkenning og heimild

Sambært galdandi umhvørvisgóðkenning fyri alivirksemi á Sandsvág, aliøki A-90, mál nr. 14/00590-20 treyt 5.1.2., kann økisásetingin ikki víðkast ella broytast fyrr enn Umhvørvisstovan hevur góðkent tað.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampar, sum kunnu standast av virkseminum og at varðveita lívfrøðiliga margfeldið.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning ella loyvi eftir aðrari lóggávu.

## 3. Málsviðgerð

Tilfar frá P/F Mowi Faroes hevur verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini.

Stødd og staðseting av aliøkjum, har alivirksemið kann fara fram, verður ásett í loyvisbrævi til aling á sjónum, sum verður givið av Aliumsitingini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Trý ymisk øki hava verið nýtt til aling á Sandsvág. Núverandi aliøki varð staðsett í 2017. Í 2004-2006 var aliøkið innanfyri útnyrðingsøkið á núverandi aliøki (Mynd 1) og í 2014-2017 var aliøkið beint eystanfyri og mitt fyri. Botnkanningar á hesum trimum økjunum vísa, at botnurin í høvuðsheitum er sandur, men á uttasta økinum var eisini skeljasandur og grús. Frá núverandi aliøki og inneftir er mett, at botnslagið er fínur sandur allan vegin inn at landi. Undankanningar á øllum økjunum hava víst, at botnurin er ódálkaður, og kanningar av djóralívinum vísa, at fjølbroytni er lágt. Sambært frágreiðingum hjá Biofar er lága fjølbroytni fyri djóralív mett at verða náttúrligt fyri sandbotn við nógvari alduávirkan.

Streymmátingar á økinum vísa, at í stóran mun ferðast sjóvarfallsrákið á Sandsvág inn við norðara landinum á vágni og út við sunnara. Sjógvútskiftingin verður mett at verða góð.

P/F Mowi Faroes (fyrr P/F Marine Harvest Faroes) hevur havt aliloyvi á Sandsvág síðan 2014. Fleiri royndir vórðu gjørdar, áðrenn fiskur varð settur út fyrstu ferð í 2016. Eftir illveður um jólini í 2016, var stórt felli staðfest á Sandsvág. Ringar og onnur útgerð toldu illveðrið, men fiskurin toldi tað ikki og tí doyði størsti parturin av fiskinum. Eftir at hava gjørt ymiskar kanningar á økinum sást, at høg alda og hart rák samstundis var orsøkin. Eisini vísti fiskurin týðilig tekin á skræðuni, at hann hevði ligið ímóti ella nortið við nótina.

Fleiri mátingar vóru gjørdar á Sandsvág, og niðurstøðan var, at um aliøkið var flutt longur inn á vágna, var aldan lægri og rákið spakari. Í 2017 varð loyvi givið at flyta aliøkið longur inn á vágna. Umhvørvisstovan gjørdi eitt ískoyti til umhvørvisgóðkenningina fyri broyttu staðsetingina av aliøki A-90, har eisini var staðfest, at treytirnar í umhvørvisgóðkenningini, mál nr. 14/00590-20, vóru galdandi fyri alivirksemi á nýggju økisásetingini.

Ætlanin hjá P/F Mowi Faroes er nú at víðka verandi aliøkið, frá 58.500 m$^2$ til 110.700 m$^2$. Sambært ætlanini verður aliøkið víðkað 90 m inn ímóti sandinum, har tveir nýggir ringar skulu liggja, og eisini 90 m úteftir, har ætlanin er at leggja ein tóman ring, har ymiskar mátingar og kanningar skulu gerast, til dømis trýst- og streymmátingar. Harafturat er ætlanin at leggja ein fóðurflaka innanfyri rammuna. Mynd 2 niðanfyri vísur ætlaðu víðkanina av aliøkinum.




**Mynd 1:** Ætlað víðkan av aliøkinum (grønliga økið) í mun til verandi aliøki (reydliga økið).

P/f Mowi Faroes hevur havt fisk á verandi aliøki í tvey framleiðsluumfør, og metur at rætta útgerðin og staðseting er funnin, so at tað er ráðiligt at ala. Tí metir P/F Mowi Faroes seg nú kunna økja um talið á laksi, sum verður sett út, og fyri at kunna økja um tali av fiski, er neyðugt at víðka aliøkið. P/F Mowi Faroes metir ikki, at dálkingarviðurskiftini verða broytt munandi orsaka av, at økið verður víðka.

Botnkanningar eru gjørdar við størsta biomassa tær báðum útseturnar, sum hava verið á núverandi aliøki. Úrslitini av hesum kanningum vísa, at fyri útsetuna í 2016, tá ið 261.015 fiskar vóru settir út, var økið í støðu 1, ódálkað og fyri útsetuna 2019, tá ið 621.187 fiskar vóru settir út, kom økið í støðu 2, nakað dálkað.

Tað, at økið verður víðkað, ger, at møguleiki er at økja um talið av útsettum fiski. Hetta ger at fóðurnýtslan á økinum eisini økist. Tískil metir Umhvørvisstovan at víðkanin av aliøkinum á Sandsvág kann føra við sær, at dálkingartrýstið økist munandi.

Umhvørvisstovan metir útfrá teimum upplýsingum, sum eru tøkar, at tað er sannlíkt, at botnslagið og útskiftingin á víðkaða økinum er hin sama sum á økinum annars.

Umhvørvisstovan metir, at treytirnar í verandi Umhvørvisgóðkenning, mál nr. 14/00590-20, eru nøktandi fyri at hava eftirlit við víðkaða aliøki A-90 á Sandsvág.

## 4. Avgerð

Umhvørvisstovan gevur ískoyti til verandi umhvørvisgóðkenning, mál nr. 14/00590-20, fyri alivirksemi á víðkaða aliøki A-90 á alifirði C-17, Sandsvág og Skúvoyarfjørður.

Treytirnar í umhvørvisgóðkenningini, mál nr. 14/00590-20, eru galdandi fyri alivirksemi á víðkaða aliøkinum.

## 5. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:**

Sands kommuna, Mørkin Mikla 3, 210 Sandur
Heilsufrøðiliga starvsstovan, Smyrilsvegur 7, 2. hædd, 100 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, 110 Tórshavn